# Út í stóru verð við Leivi og Mariusi






**Sjónvarpið fer annað hvítusunnukvøld undir at senda eina nýggja spurnarkapping, sum verður kallað "Borð um Borð". Í spurnarkappingini verða luttakararnir spurdir um viðurskifti, sum hava við skip, hav og annað tílíkt at gera**

REPORTASJA
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Seinnapartur er, og upptøkurnar til nýggju spurnarkappingina "Borð um Borð" skulu byrja. Luttakararnir, sum skulu vera við hesuferð, standa og hyggja eftir pallsmíðnum, sum Edward Fuglø hevur staðið fyri. Pallurin er skipaður sum aftasta dekkið á einum skipi, og úti í síðunum eru signalfløgg, modellskip og annað, sum ber bráð av, at hetta hevur við skipskunnleika at gera. Aftasti parturin av pallinum skal ímynda sóldekkið, har áhoyrararnir sita, og fáa sær kaffi og annað gott, meðan spurnarkappingin er í gongd.

– Er hetta flaggið q?, spyr ein av luttakarunum.

– Nei, q er gult, vil ein annar vera við. Soleiðis gongur prátið aftur og fram, meðan bíðað verður til klárt er at fara undir upptøkurnar.

Kameramenn, ljósfólk og luttakarar ganga og hugna sær á dekkinum. Prátið er skipsprát. Luttakararnir vita nakað, tað er so heilt vist.

Fremst á pallinum er eitt hjól. Nei, tað er ikki gekkhjólið, men eitt hjól, ið er formað sum ein kumpass, og í teimum ymsu ættunum, eru ymisk evni, sum til dømis, persónar, heiti, reiðskapur, sangir, árstøl og annað, og alt hetta hevur við skip og hav at gera.

Kappingin sjálv er skipað í fýra umfør. Í fyrsta umfarið verður kumpassin snarað, og har fáa bæði liðini hvør sínar tríggjar spurningar. Næsta umfarið er at fáa eitt orð burturúr nøkrum bókstavum, triðja er ein mynd, og hartil hoyra tríggir spurningar, og fjóðra og seinasta umfarið eru 15 snarspurningar, har trýstast skal á ein knøtt áðrenn svarað verður.

## Sjómansskúlin

Í sjónvarpinum henda seinnapartin er sjómansskúlin væl umboðaður. Tríggir av luttakarunum hava tilknýti til skúlan, og áhoyrararnir, ella kanska klapparararnir, eru eisini frá sjómansskúlanum. Teir koma inn nakrar minuttir áðrenn upptøkurnar byrja.

Leivur Hansen, sum er vertur í Borð um Borð, gevur áhoyrarunum boð um, hvussu alt gongur fyri seg, og fortelur teimum, hvussu sendingin skal vera.

– Vit skulu ímynda okkum, at vit eru umborð á Norrønu til ein harmonikutúr. Lagið er gott, og vit hava fingið Spælimenninar við okkum at spæla. Tit hugna tykkum á dekkinum, og seinni fara tit eisini at fáa ein drink frá tveimum gentum, sum koma inn við bakkum, greiðir Leivur sjómansskúlanæmingunum frá.

Nú er tíðin komin til eina ljóðroynd.

– Ein hálvur minuttur, so fara vit í gongd, og minnist til at sløkkja fartelefonirnar, sigur ein rødd, sum ongin veit, hvaðani hon kemur.

## Mistøk

Soleiðis, nú eru upptøkurnar byrjaðar. Luttakararnir siga, hvørjir teir eru, og farið verður í gongd við sjálva spurnarkappingina. Nakrir feilir koma fyri av og á, men ongin panikkur hóast alt. Tað verður bara róliga tikið umaftur.

Spælimenninir spæla, og fólk hugna sær. Ein fær veruliga ein dám av, hetta kundi gott verið ein harmonikutúrur við Norrønu.

Í dag gongur væl at taka upp. Marius Rein, sum er dómari, og Leivur klára seg bara væl. Stýriborðs og Bakborðskipini á talvuni, eru farin ein túr runt í heimin. Skipini verða flutt eitt stig á einum korti, har dómarin stendur. Kortið er av Evropa og Afrika.

Nú eru vit longu komin til snarspurningarnar. Men hvat? Knøttarnir, sum luttakararnir skulu trýsta á, rigga ikki sum teir skulu. Tann grøna stýriborðslyktin og tann reyða bakborðslyktin rigga ikki sum tær skulu. Men aftaná eina løtu av baksi, so koyrir alt, sum tað eigur, og nú er klárt at fara undir snarspurningarnar. Og tað er ikki uttan grund, at snarspurningarnir hava fingið júst hetta heitið, tí lítla løtu eftir, eru snarspurningarnir lidnir, og genturnar koma inn við sjokulátu og einum gávukorti til tað liðið, sum tapti.

Upptøkurnar eru lidnar. Triðja sending av Borð um Borð er komin í kassan og nú er bert eftir at redigera. Verturin takkar luttakarum og áhoyrarum fyri, og restin av manningini pakkar saman.

Eitt sindur øðrvísi er tað, at síggja upptøkurnar handan pallin. Øðrvísi enn tá tú situr heima í stovuni, og sær eina liðugt gjørda sending. Meira baks og roks enn tú kanska heldur, men í síðsta enda, so er tað undirhald. Undirhald, sum helst nógv fara at njóta.






# Tjóðveldisflokkurin var lítið áhugaður fyri samgongu



*Fólkakirkjan var eitt av málunum, sum skuldu verið yvirtikin, um tann samgongan, sum næstan var í pottinum, hevði fingist upp á pláss. Men Tjóðveldisflokkurin tóktist ikki sinnaður fyri henni, tí sjálvstýristilgongdin gekk ov seint, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Tað var stórt spell, at tann breiða samgongan millum verandi samgongu og Javnaðarflokkin ikki varð til nakað. Hon var annars mestsum í pottinum, men líkt var til, at Tjóðveldisflokkurin ikki vildi vera við, tí fullveldistilgongdin gekk ov seint, sigur tingmaður Sjálvstýrisfloksins**

VIÐTAL
*Edvard Joensen*

– Tað var harmiligt, at tann breiða samgongan, sum annars var um at vera í pottinum, ikki gjørdist veruleiki. Men grundin tóktist vera tann, at Tjóðveldisflokkurin ikki var sinnaður fyri at vera partur av henni, sigur Kári P. Højgaard, tingmaður Sjálvstýrisfloksins.

Grundina fyri at so varð metir Kári Højgaard vera, at ferðin á sjálvstýrisleið var lækkað munandi, í mun til hana, verandi samgonga helt. Og tað kundi Tjóðveldisflokkurin ikki góðtaka, heldur sjálvstýristingmaður.

– Eg síggi ikki aðra grund til, at samgongan var av ongum, enn, at tjóðveldisflokkurin ikki vildi vera við, staðfestir hann.

Hann sigur, at tá samráðingarnar slitnaðu, vóru heili 13 yvirtøkumál klár, umframt at semja var um at arbeiða fram í móti yvirtøku av løgreglu og rættarmálum. Eitt nú var eisini semja um at yvirtaka fólkakirkjuna, vísir Kári Højgaard á.

## Ov nógv ferð

Valið vísti, at ferðin á sjálvstýristilgongdini var ov nógv, heldur Kári Højgaard. Sambandsflokkurin fekk tveir tinglimir afturat, sum fóru frá samgonguni.

– Tað er sera týdningarmikið at taka valúrslitið í álvara, sigur Kári Højgaard. Og úrslitið var greitt tað, at fólk vóru ótrygg við sjálvstýristilgongdina, sum verið hevði.

Sjálvstýrisflokurin skal eisini liva aftan á hetta valskeiðið, tí hava vit skyldu at lurta eftir teimum signlum, sum veljarin sendir, sigur Kári Højgaard.

Tað tulkar sjálvstýristingmaðurin sum, at nú skal haldast aftur. Og tað var júst tað, Sjálvstýrisflokkurin eisini vildi, tá samgongusamráðingarnar vóru.

– Vit vildu heldur gjalda niður av skuldini, vit hava, enn at yvirtaka fleiri dýr mál, og átaka okkum størri fíggjarliga byrðar beint nú, sigur Kári Højgaard. Kortini var pláss fyri fleiri yvirtøkum, sum ikki kostaðu so nógv, at vit ikki knógvaðu undir tí, sigur hann.

Kári Højgaard sigur, at hann væntar ikki, at tað fæst meira burtur úr á sjálvstýrisleið, enn tað sama, sum komið varð til undir teimum samráðingunum, sum slitnaðu.

## Vil hava breidd

Sum flestu aðrir tinglimir metir Kári Højgaard tað sera týdningarmikið at fáa eina breiða og sterka samgongu.

Hann dylur ikki fyri, at hann hevði stórar vónir til tær samráðingarnar, sum vóru. Men tá tað ikki bar til, eigur tann næsta at vera ein líka breið hinumegin. Tað vil siga við Sambands flokkinum í staðin fyri Tjóðveldisflokkinum.

Kári Højgaard metir, at tað ber til at fáa fleiri av yvirtøkunum framdar saman við Sambandsflokkinum, tí tær eru av slíkum slag, at tær væl kunnu forsvarast fíggjarliga.

Hann sigur seg vera sannførdan um, at eitt nú fólkakirkjuna ber væl til at yvirtaka saman við Sambandsflokkinum, um bara fyrireikingararbeiðið er ordiliga gjørt.

Eina 17-manna samgongu við Miðflokkinum heldur Kári Højgaard ikki vera nakra haldgóða loysn, tí hon verður ov veik. Men hann hevur einki í móti at fáa Miðflokkin við sum eitt nú nummar 24 í eini breiðari samgongu.

Tó ásannar hann, at tað verður sera torført at fara at býta málsøki, um so nógvir flokkar vera í samgonguni.

Tann møguleikan, at hann sjálvur og Sjálvstýrisflokkurin ikki sleppa við, meðan eitt nú Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin skipa eina breiða 22-manna samgongu, heldur hann ikki vera realistiskan.

– Vit hava eina avtalu um samstarv, sum vit fara at halda. Og so vænta vit eisini, at hon verður hildin frá hinum partinum, sigur Kári Højgaard.

## Formansvalið

Hóast tað, at Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin hava avtalað at standa saman í samgongusamráðingum, metti Kári Højgaard ikki, at tann avtalan var galdandi, tá løgtingsformaðurin skuldi veljast. Hann atkvøddi tí saman við Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum fyri Edmundi Joensen.

– Løgtingsformaðurin eigur at vera hevjaður yvir politiskt orðaskifti, og skal vera ein persónur við tign og myndugleika, sigur Kári Højgaard. Og júst sum slíkan kenni eg Edmund Joensen, sigur hann.

Hann sigur, at teir 14 mánaðarnar, hann hevur sitið á tingi, hevur Edmund Joensen verið triðji næstformaður, og regluliga sitið í formanssætinum. Út frá teimum royndunum metti Kári Højgaard, at Edmund Joensen var væl egnaður til løgtingsformann.

Kári Højgaard heldur, at við formansvalinum hevur Sambandsflokkurin boðað frá, at hann ikki fer at gøllhalda um kravið um at fáa løgmann í eini komandi samgonu.

Hinvegin metir Kári Højgaard, at royndirnar hjá sitandi løgmanni gera, at hann avgjørt er eitt kvalifiserað boð upp á sessin í komandi samgongu.

## Framtíðin

Tað liggur stór ábyrgd á Sjálvstýrisflokkinum, sigur Kári Højgaard. Og nú er tað upp til hansara, sum einsamallur løgtingsmaður, at liva upp til hesa ábyrgd.

Men hann er sannførdur um, at spælir hann síni kort væl, skal tað koma flokkinum til góðar aftur við eitt komandi val. Tá eigur og má flokkurin aftur koma upp á einar tríggjar tinglimir, heldur hann.

Tann gongdin, sum verið hevur við formansskifti, eins og tað at flokkurin misti ein mann á,valinum, má kunna vendast.

Men treytin er heilt greitt tann, at flokkurin sleppur við í eina samgongu og kann reka ein varnan politikk, sum ber á sjálvstýrisleið. Stig fyri stig, vísir sjálvstýristingmaðurin á.

– Koma vit í eina samgongu, sum heldur valskeiðið út, eri eg sannførdur um, at tað ber til. Og tað hevði eisini verið hugaligt at hildið ein 100 ára dag í teirri vissuni, sigur Kári P. Højgaarrd, tingmaður Sjálvstýrisfloksin og sipar har við til, at Sjálvstýrisflokkurin varð stovnaður í 1906.